# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Axel Mortensen, vanligur nevndur Akka, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn**, andaðist í heiminum leygardagin, 91 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja lata blómur ella krans kunnu lata Vesturkirkjuni eina gávu.

**Marita Thorkildshøj, Tórshavn,** andaðist í heiminum fríggjadagin, 64 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.

# Magni Arge 50 ár

Í dag, týsdagin 15. desember, fyllir Magni Arge á Argjum, stjóri í Atlantic Airways, 50 ár.

Magni Arge er yngstur av teimum fimm børnunum hjá Petru og Niels Juel Arge í Havn.

Eins og pápin og elsti bróðurin hevur Magni verið nógv at hoyrt í Útvarpinum í sambandi við fótbóltsdystir og kappróður. Eins og teir dugir hann at gera sendingarnar, sum eru áhugaverdar og spennandi at lurta eftir. Tað sær eisini út til at sonurin, Tróndur, hevur arvað somu eginleikar.

Tá fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton vitjaði í Føroyum í 2007, fekk Magni, sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, til uppgávu at vísa honum landið. Magni dugir væl at føra seg fram og hevur orðið í síni makt.

Magni hevur annars roynt seg á nógvum ymiskum økjum. Hann hevur lisið stjórnarfrøði við universitetið í Århus og journalistikk á journalistháskúla í Danmark.

Síðst í 80-unum var hann stjóri í Nýggja Bókhandli, og fyrstu árini í 90-unum var rak hann saman við Sveini Thomassen telduhandlinum T-Mac í Vágsbotni.

Síðan 1995 hevur Magni verið stjóri í Atlantic Airways, umframt at hann hevur verið í nógvum ymiskum nevndum.

*-red*



*Magni Arge saman við fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




## Tøkk

Í sambandi við at

**Anna Julina Thomassen**
vanliga nevnd Annelin

andaðist á Ellisheiminum í Tórshavn.

Vit vilja takka starvsfólkunum á Ellisheiminum, sum vóru um Annelin í tí dagliga, øllum, sum vóru til andaktina á Ellisheiminum, í kirkjuni, í kirkjugarðinum og til ervið á Hafnia, og vístu samkenslu.
Takk fyri kransar, blómur og peningagávur til Ellisheimið.
Somuleiðis vilja vit takka Sonju Klein, presti, kirkjutænarum, sangarum og gravarum fyri hjálpina.

*Familjunnar vegna*
**Ellen og Thomas**

## Dagurin

15. desember. Nikatius, deyður í 5. øld. Biskupur í Reims í Fraklandi. Varð fyribeindur av heidningaflokki av Húnalondum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



# MERKISDAGAR

**Diamantbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava Helena og Kristian Poulsen, Skála, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.